LM-030/2025

Sólgerð Hjørleifsdóttir

FYLGISKJAL 5

Fra: Astrid Reinert Øregaard
Sendt: 27. august 2025 13:01
Til: Almanna- og mentamálaráðið
Cc: Jákup Andrias Kristiansen
Emne: SV: Til ummælis: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (Afturrindan til smærri vinnurekandi fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, sum hava verið óarbeiðsførir vegna sjúku longur enn 4 vikur)
Vedhæftede filer: 25_21665-2 Hoyringarsvar frá Umhvørvismálaráðnum, broytingar í sjúkradagpengalógini 2900739_1_0.docx

Góðan dag

Sí hjáløgdu viðmerkingar hjá Umhvørvismálaráðnum til **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.** *(Afturrindan til smærri vinnurekandi fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, sum hava verið óarbeiðsførir vegna sjúku l□ngur enn 4 vikur).*

Vinarliga

Astrid R. Øregaard
fulltrúi

Mobil: +298 558072
AstridR@umhvorvi.fo

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Umhvørvismálaráðið
Ministry of Environment
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Office +298 358700
www.umhvorvi.fo

Fra: Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>
Sendt: hósdagur, 7. august 2025 15:08
Til: industry@industry.fo; samverk@samverk.fo; starvsfelag@starvsfelag.fo; AV Almannaverkið <av@av.fo>; Føroya Kærustovnur <fks@fks.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Barna- og útbúgvingarmálaráðið <bumr@bumr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>
Cc: Jákup Andrias Kristiansen <jakupA@ammr.fo>

LM-030/2025

Emne: Til ummælis: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (Afturrindan til smærri vinnurekandi fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, sum hava verið óarbeiðsførir vegna sjúku longur enn 4 vikur)

Góðan dag,

Til ummælis verður sent **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.** *(Afturrindan til smærri vinnurekandi fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, sum hava verið óarbeiðsførir vegna sjúku l□ngur enn 4 vikur).*

Biðið verður um at hava møguligar viðmerkingar í hendi í seinasta lagi 4. september 2025, kl. 15.00.

Vinarliga / *Kind regards*

ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Social Affairs and Culture

Eirargarður 2 / FO-110 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 304000 / ammr@ammr.fo / www.ammr.fo

LM-030/2025

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Tórshavn, tann 27. august 2025
J. nr.: 25/21665
Viðgjørt: ARØ

Til Almenna- og mentamálaráðið

Umhvørvismálaráðið hevur fingið til ummælis uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. *(Afturrindan til smærri vinnurekandi fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, sum hava verið óarbeiðsførir vegna sjúku longur enn 4 vikur).*

Yvirskipað hevur Umhvørvismálaráðið ikki viðmerkingar til lógaruppskotið. Tó hevur Umhvørvismálaráðið nakrar ítøkiligar viðmerkingar til einstøk viðurskiftir í lógaruppskotinum, sum Almanna- og mentamálaráðið kann umhugsa:

- **Onki stk. 2 í § 13, a**
  Víst verður á, at nýggja ásetingin í lógaruppskotinum hevur bara stk. 1 og 3.

- **§ 13 a, stk. 3**
  Tað hevði verið skilagott at skriva, hvønn sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag meint verður við. Høvuðssáttmálan ella fastlønarsáttmálan. Sí § 43 í arbeiðsskaðatryggingarlógini og § 16 í ALS-lógini sum dømir.

- **§ 9 í løgtingslógini**
  Í nýggju § 13 a, stk. 1, verður víst til §§ 8-9 í løgtingslógini.
  - § 9, stk. 2, nevnir eisini "sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag". Vísandi til viðmerkingina omanfyri verður víst á, at tað møguliga kann vera ivamál um, hvønn sáttmála, meint verður við. Víst verður eisini á, at tilvísingin í § 9, stk. 2, til tað við lóg ásetta vikutímatalið hjá ófaklærdum, kann vera óheppið. Helst verður meint við løgtingslóg nr. 37 frá 1. juni 1978 um 40 tímars arbeiðsviku. Tó var tann lógin bara galdandi fyri tímaløntar løntakarar, og tá lógin kom í gildi, vóru trý sáttmálaøkir, har lønt varð pr. tíma, nevniliga fyri arbeiðarar, handverkarar og prentarar.
  - Sambært § 9, stk. 3, verður eisini veitt frítíðarløn av dagpeningaveitingini, sum fer í grunn. Fyri tað fyrsta skal viðmerkjast, at Frítíðarlógin varð broytt í 2022. Broytingin hevði m.a. við sær, at Frítíðargrunnurin varð avtikin. Nú verður frítíðarløn goldin á

frítíðarlønarkontu, sum TAKS umsitur. Harnæst verður víst á, tað helst ikki er skynsamt, at § 9, stk. 3, í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. skal galda fyri endurgjald til arbeiðsgevarar, tí at hesir kunnu ikki fáa frítíðarløn útgoldna frá TAKS.

- Spurt verður um § 9, stk. 6, eisini skal galda fyri útgjald til arbeiðsgevarar.

- **BAS og ALS**
  Á s. 7 í lógaruppskotinum stendur, at hugtakið, samlaðar lønarútreiðslur, skal skiljast breitt og fevnir m.a. um *BAS* og *ALS*. Mett verður, at tað er betri at skriva *barsilsgjald*, tí *BAS* er ikki ein vanlig stytting av barsilsgjaldi. Mett verður eisini, at tað er betri at skriva *ALS-gjald* heldur enn *ALS*.

- **"Stórur partur av lønarútreiðslunum verður endurrindaður"**
  Tað er ikki so neyvt, tá tað stendur í lógaruppskotinum, m.a. mitt á s. 2 og ovast á s. 3 og í serligu viðmerkingunum, at smærri vinnurekandi fáa rætt til at fáa endurrindaðan ein *stóran part* av lønarútreiðslunum til starvsmenn, ið verða langtíðarsjúkir. Endurrindanin er avmarkað til í mesta lagi 80 % av eini arbeiðaraløn, og starvsmenn kunnu hava ymiska løn, summir kanska væl hægri enn 30.000 kr. um mánaðin. Sostatt er støddin á endurgjaldinum relativ.